# Almannamálaráðið

**Lógartænastan**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 2. november 2020 |
| Mál nr.: | Skrivið her |
| Málsviðgjørt: | DB |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð
um
stuðulstænastu**

Við heimild í § 35, stk. 3 og § 36, stk. 4 í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur verður ásett:

**§ 1.** Stuðulstænasta verður veitt fyri at menna og endurmenna førleikar hjá tí einstaka, soleiðis at viðkomandi kann liva eitt sjálvstøðugt, innihaldsríkt, virkið og støðugt lív.

*Stk 2.* Tænastan verður veitt sum

1) námsfrøðilig leiðbeining,
2) umsorgan og praktisk hjálp til dagligar uppgávur og fíggjarviðurskifti,
3) fylgjari til sosial tiltøk, og
4) vøka og hjávera, ið er uttanfyri ábyrgdarøkið hjá kommunu og heilsuverkinum.

*Stk.3.* Stuðulstænasta fevnir ikki um persónliga røkt ella sjúkrarøkt. Er talan um barn, fevnir stuðulstænastan um persónliga røkt.

*Áseting av stuðulstímum*

**§ 2**. Almannaverkið tekur avgerð um stuðulstænasta verður veitt, hvussu stuðulstænastan verður veitt og hvussu nógvir stuðulstímar verða veittir.

*Stk. 2.* Almannaverkið ásetir tal av stuðulstímum soleiðis:

1) Lættan tørv upp til 5 tímar um vikuna
2) Miðal tørv millum 5 og 10 tímar um vikuna
3) Stóran tørv millum 10 og 20 tímar um vikuna.

*Stk. 3.* Persónur kann í mesta lagi fáa stuðulstænastu 20 tímar um vikuna.

*Stk. 4.* Almannaverkið kann víkja frá mest loyvda tímatali í stk. 2 ella minst loyvda tímatalinum í § 5, stk. 2 vegna vantandi pláss á bústaði sambært §§ 45 ella 46 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur ella vegna serligar umstøður.

*Stk. 5.* Avgerðin sambært stk. 1 - 4 verður tikin við støði í ynski og tørvi hjá persóni, sosialfakligari meting og fíggjarliga

rásarúminum fyri tænastu hjá Almannaverkinum.
*Stk. 6.* Persónur, sum hevur fingið játtað stuðulstænastu, verður settur á bíðilista, um tænastan ikki er tøk.
*Stk. 7.* Almannaverkið skal í minsta lagi árliga endurskoða játtaða tímatalið.

*Virkisætlan*

**§ 3**. Almannaverkið tilevnar virkisætlan saman við honum, sum fær stuðulstænastu. Er talan um barn ella persón, sum hevur verja, verður virkisætlanin tilevnað saman við foreldrum, verja ella dagligum umsorganarpersóni.
*Stk. 2.* Ynskir ella megnar tann, sum fær stuðulstænastu, ikki at viðvirka til at gera virkisætlan, ger Almannaverkið virkisætlan, sum starvsfólk arbeiða eftir.
*Stk. 3.* Almannaverkið skal tryggja, at virkisætlan er partur av ætlan sambært § 3 stk. 3 og 4 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, tá talan er um persón, sum hevur umfatandi og samansettan tørv.

**§ 4.** Almannaverkið kann endurrinda stuðli meirútreiðslur av virkseminum av játtaðu stuðulstímunum og sum ikki kunnu rindast av øðrum skipanum, t.d. fylgjarakort.

*Borgarastýrd stuðulstænasta*

**§ 5.** Stuðulstænasta sambært § 1, stk. 2, nr. 2-4, kann veitast soleiðis, at persónur, sum fær stuðulstænastu, sjálvur ger av, hvør skal virka sum stuðulsfólk, hvat stuðulstænastan skal nýtast til, og nær.
*Stk. 2.* Treytin er, at persónurin sjálvur, verji, dagligi umsorganarspersónurin ella foreldur, tá talan er um barn, kann gera av, hvør skal virka sum stuðulsfólk, hvat stuðulstænastan skal nýtast til, og nær.
*Stk. 3.* Stuðulspersónur verður settur í starv hjá Almannaverkinum og verður løntur sambært sáttmála. Almannaverkið skal góðkenna tann, ið settur verður.
*Stk. 4.* Maki, foreldur og systkin kunnu ikki setast sum stuðulsfólk sambært stk.1.
*Stk. 5.* Stuðulstænasta, sum fevnir um minni enn 2 tímar um vikuna, kann ikki skipast sum borgarastýrd stuðulstænasta, sbr. tó § 2, stk. 3.

*Kæra*

**§ 6.** Avgerð hjá Almannaverkinum sambært hesi kunngerð kann kærast til kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum.

*Gildiskoma*

**§ 7.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2021.

Almannamálaráðið, 2.november 2020

**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen